FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

10. september 2024
Mál: 23/19953-2

Tygara skriv: 52-016/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-016/2024 frá Magnus Rasmussen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um Funningsfjarðarvegin.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður farið í holt við framhaldandi vegagerð gjøgnum bygdina í Funningsfirði?
2. Nær verður arbeiðið liðugt fyri játtanina, sum er til arbeiðið í ár?

Svar:

Í 2019 byrjaði Landsverk arbeiðið við at breiðka vegin frá Millum Fjarða til Funningsfjørð og er hildið fram við arbeiðinum í 2021, 2022 og 2023. Samanlagt eru 14,2 mió. kr. brúktar til farleiðina hesi árini, og í ár eru 2 mió. kr. játtaðar.

Vegurin liggur rímiliga væl, men er smalur og ikki bygdur til ferðsluna í dag. Ætlanin við verkætlanini er at gera allan vegin tvíbreytaðan, at avrætta og asfaltera vegin, og at gera gongubreyt á einum parti av vegastrekkinum.

Nýggjasti arbeiðstøkusáttmálin varð undirskrivaður í juni 2024 og fevnir um eitt strekki á 300 metrar av Funningsfjarðarvegnum. Arbeiðið er í gongd og verður í gerð árið út.

Dennis Holm
landsstýrismaður